# Evert Taube konsert í Miðlahúsinum í kvøld

**Fyrsta konsertin í samband við fløguútgávuna hjá Lylla Eliasen og Niels Midjord úr Fuglafirði verður í Miðlahúsinum í kvøld kl. 19.**

TÓNLEIKUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Saman við Niels Midjord og Lylla Eliasen fer Rói Eliasen – sonur Lylla – at leika á klaverið í Miðlahúsinum. Konsertin verður bygd soleiðis upp, at talan verður um bæði frambornan sang, og felagssang. Niels og Lylli fara fyrst at syngja 2-3 sangir hjá Taube, sum Niels hevur føroyskað. Eftir hetta verður boðið til tveir felagssangir. Eitt sanghefti við føroyskum Evert Taube týðingum er prentað, og verður sungið úr hesum sangheftinum. Í sangheftinum eru eisini sangirnir, sum Herman Jacobsen gjørdi kendar á plátuni, sum hann gav út saman við Ad Libitum. M.a. “Gentan í Peru”, “Kyndaravalsurin”, “Karl á Bakka” og aðrir Taube-klassikarar. Andreas Andreassen í Vestmanna hevur eisini týtt tveir av Taube-sangunum! Síðani verða aftur nakrir frambornir sangir, og so verður aftur boðið til felagssang úr Taube-sangheftinum. Niels og Lylli ynska, at konsertin eisini skal verða ein interaktiv uppliving. Atgongumerkið til hesa sera forkunnugu konsertina kosta 50 kr.

## Upptikin í gomlum húsum!

Sangirnir hjá Evert Taube, sum livdi árini 1890-1976, eru frá tíðarskeiðnum 1922-1950. Evert Taube vaks upp á oynni Vinga, sum liggur tætt við Göteborg. Niels hevur gingið á Norðurlendsku Vísulinjuni á Kungälv, og er tað tí ikki so løgið, at hann hevur fingið stóran tokka til yrkingarnar hjá Evert Taube. Men so gamlir, sum tekstirnir hjá Evert Taubeeru, so eru teir kortini ikki eldri enn upptøkuhølini, sum Niels og Lylli hava nýtt til at taka fløguna upp við. Teir 14 sangirnir á fløguni, har Niels og Lylli tulka Taube á føroyskum, eru tiknir upp í einum húsum, sum hava sína heilt serliga søgu. Fyrndarhúsini, sum standa millum Fuglafjarðar Kirkju og Fuglafjarðar Bókasavn eru nevnliga flutt fýra(!) ferðir. Húsini stóðu fyrst í Lamba, blivu tikin niður, og blivu so reist upp aftur við Garð í Fuglafirði. Blivu aftur tikin niður, og reist upp aftur á Høvda. Seinni blivu húsini aftur flutt, fyrst út á Kambsdal, har tey blivu sett í stand. Síðani blivu tey flutt til staðið har, sum tey standa nú. Nú standa tey á grundøkinum hjá einari abbadóttir hjá einum manni, sum vaks upp í teimum somu húsinum, tá tey stóðu á Høvda! “Tann óviðgjørdi viðurin gevur eitt so framúrskarandi, nátúrligt ljóð!” sigur Niels við Sosialin. Fólk, sum koma til Taube-konsertina fáa sjálvsagt høvið at ogna sær eitt eintak av hesari forkunnugu fløguni, sum er tikin upp í teimum forkunnugu, gomlu húsunum. Originalitetur og genialitetur fylgjast hond í hond! Gamli viðurin í Miðlahúsinum fer eisini at bera Niels, Lylla og Róa í kvøld.



*Niels Midjord og vinir hansara hava sera forkunnuga konsert í Miðlahúsinum, har Evert Taube er á skránni*


www.ivan.fo

**Stórt úrval av góðum, brúktum bilum**



**Citroen Berlingo 1.8i Multi**
**Árg:** 2001 **Km:** 96.000
**Prísur fyrr:** 90.000
**Prísur NÚ:** 65.000



**Citroen Xsara 1.6i Week**
**Árg:** 2003 **Km:** 51.000
**Prísur fyrr:** 120.000
**Prísur NÚ:** 90.000
Elegance útgávan. Diesel



**Citroen Xsara 2.0 HDi Week**
**Árg:** 2001 **Km:** 122.000
**Prísur fyrr:** 105.000
**Prísur NÚ:** 70.000



**Ford Focus 1.6 stc. Ghia**
**Árg:** 2003 **Km:** 111.000
**Prísur fyrr:** 150.000
**Prísur NÚ:** 135.000



**Kia Carnival 2.9TD**
**Árg:** 2000 **Km:** 105.000
**Prísur fyrr:** 120.000
**Prísur NÚ:** 69.000
Bilurin hevur 7 setur



**BMW 316i**
**Árg:** 1999 **Km:** 85.000
**Prísur fyrr:** 159.000
**Prísur NÚ:** 120.000
Bilurin hevur 1.8 ccm motor



**Citroen Berlingo 1.6i Multi**
**Árg:** 2002 **Km:** 55.000
**Prísur fyrr:** 105.000
**Prísur NÚ:** 75.000
Eyka dekk fylgja við



**Peugeot 206 1.6**
**Árg:** 2004 **Km:** 70.000
**Prísur fyrr:** 120.000
**Prísur NÚ:** 95.000
Eyka dekk fylgja við



**Mercedes C180 Komp.**
**Árg:** 2006 **Km:** 18.000
**Prísur fyrr:** 395.000
**Prísur NÚ:** 365.000
Bilurin hevur automatisk gear. Verður seldur fyri kunda



**Toyota Avensis 1.8 Sol**
**Árg:** 2005 **Km:** 36.000
**Prísur fyrr:** 210.000
**Prísur NÚ:** 190.000
Verður seldur fyri kunda



**Mitsubishi Pajero Sport**
**Árg:** 2005 **Km:** 22.000
**Prísur fyrr:** 280.000
**Prísur NÚ:** 260.000
2.5 TD motor. 1 ára garanti eftir. Sportfelgur, skermhækkarar



**Audi A6 2.4 aut.**
**Árg:** 2004 **Km:** 60.000
**Prísur fyrr:** 380.000
**Prísur NÚ:** 260.000
Bilurin hevur automatisk gear og leðurkabinu



**Mazda Premacy 1.8**
**Árg:** 2001 **Km:** 63.000
**Prísur fyrr:** 90.000
**Prísur NÚ:** 80.000

Mynd vantar

**Citroen C5 2.0 Prestige**
**Árg:** 2002 **Km:** 62.000
**Prísur fyrr:** 138.000
**Prísur NÚ:** 125.000

Mynd vantar

**Citroen Xantia 1.8 Week**
**Árg:** 1999 **Km:** 170.000
**Prísur fyrr:** 45.000
**Prísur NÚ:** 28.000

Mynd vantar

**Citroen Berlingo 1.6i**
**Árg:** 2002 **Km:** 96.000
**Prísur fyrr:** 90.000
**Prísur NÚ:** 65.000
Bilurin hevur bakkisensor

**– vitja niðan og fá eitt prát og ein royndartúr**

**Ivan Johansen Bilar**
Hoyvíksvegur 63 · tlf. 31 36 66 · ivan@ivan.fo

Prísirnir eru bert galdandi, um eingin bilur er í býti

Mercedes-Benz DODGE Jeep CITROËN CHRYSLER MITSUBISHI MOTORS